# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 4**

Trølla Pætur og Trølla Omman eru nú liðug at klippa jólapynt og hava longu hongt alt pyntið upp. Har hanga jólamenn, jólastjørnur, jólakransar og nógv nógv annað. Felags fyri alt pyntið er, at tað eru í øllum litum.

- Fínt, sigur Trølla Omman.

- Nú fara eg og tú at lata okkum í, so fara vit oman í bygdina at hyggja, tá jólamaðurin fer at tendra jólatræið.

- Ahhh sum eg eri spentur, omma, og nú eri eg so stórur, at eg ikki ræðist jólamannin longur.

Tey lata seg í og sleppa sær á dýr. Uttanfyri er kalt, klárt og eingin vindur. Tað er farið at skýma, men av tí at tað er mánalýsi, síggja tey væl framman fyri sær. Kavin, sum liggur tjúkkur um alla bygdina, glitrar sum silvur og hyggur tú upp móti himmalinum, so lýsa stjørnurnar sum smáir vakrir gimsteinar. Hetta er eitt vakurt kvøld, og øll bygdin er livandi. Summi børn standa á skí, meðan onnur leypa skalv. Tey vaksnu ganga aftur og fram eftir gøtunum. Øll eru væl ílatin, og øll eru so smílandi og blíð. Tann sum kanska er glaðast av øllum, er Kári Handilsmaður. Jólamánaðin er sum verða man altíð góður. Øll skulu keypa jólagávur, og tá Kári eigur tann einasta handilin í bygdini, so endar tað altíð við, at øll keypa gávurnar frá honum.



Trølla Pætur og Trølla Omman eru nú komin oman í bygdina. Sjálvt um tað verður ein løta afturat til jólamaðurin fer at koma, so hava fleiri fólk stillað seg rundan um pallin og jólatræið. Nøkur hyggja eftir tí stóra vakra jólatrænum, meðan onnur hyggja eftir, meðan politistarnir eru í ferð við at leggja síðstu hondina á pallin. Erling vil smíða tann síðsta seymin í pallin, men tað vil Jógvan ikki hoyra talan um. Tað er hann, sum er yvirpolitimeistari, og tað er hann, sum skal smíða tann síðsta seymin. Fólkini sum eru savnað kring pallin smáflenna eftir teimum.

- Flyt teg, sigur Jógvan

- Og lat meg sleppa fram at!

Jógvan bukkar seg niður, men tá hann er komin niður á knæ, leggur hann til merkist, at Erling hevur hamaran.

- ERLING, rætt mær hamarin beinanvegin, rópar hann.

Men í tí at Erling skal geva honum hamaran, missir Erling hamarin í høvdið á Jógvani.

- Wawww! rópar Jógvan.

- Orsaka orsaka, tað var ikki við vilja.

Men har hjálpir einki at biðja um orsaka. Skaðin er hendur, og nú er Jógvan svakur av øði. Erling sær, at har er einki annað at gera, enn at renna undan. Jógvan heldur sær fyri høvdið við aðrari hondini og við hinari hondini yvir høvdið, og við knýttum neva fer hann rennandi eftir Erlingi.

Fólkini, sum standa kring pallin halda fyri búkin, sum tey flenna. Erling loypir av pallinum og Jógvan aftaná.

- Tín ónytta, tú ert. Lat meg fáa fatur á tær, so skal eg vísa tær…

Og meðan fólkini flenna í kíki, rennur Erling við Jógvan í hølinum á sær millum húsini í Hvannadali.

Jólamaðurin er nú næstan komin oman til bygdina. Hann steðgar á fyri at rinda møðina. Veðrið er batnað, og hann hevur rímiliga góða tíð. Hann sær nú alla bygdina og tað stóra jólatræið, sum hann skal tendra í kvøld.

Tað sum jólamaðurin ikki veit er, at hann júst nú stendur beint oman fyri skúrin, har Stampi og Anthonio halda til. Inni í skúrinum hava Stampi og Anthonio funnið eitt sindur av hoyggi, sum teir hava ballað seg inn í.

- Stampi, sigur Anthonio.

- Um jólamaðurin ikki er til, hvør er tað so sum skal tendra jólatræið í bygdini í kvøld?

- Tað er ein bara ein maður, sum hevur latið seg í jólamannaklæðir. Og tig nú við hasum fjasinum – jólamaðurin er ikki til!!!

Men júst tá hendir ólukkan. Jólamaðurin, sum stendur oman fyri skúrin hjá Leikamafiuni, ætlar sær víðari, men í tí hann skal fara til gongu aftur, fer hann skramblandi niður gjøgnum kavan og niður gjøgnum takið á skúrinum.

Tað er eitt øðiligt buldur og brak. Stampi og Anthonio loypa á føtur. Teir eru hjartkiptir og halda um hvønn annan. Mitt á gólvinum liggja nakrar rustaðar takplátur, men undan tí eini plátuni stingur eitt bein undan.

*Puntur 6 til jólakalendaran*




